


**Nr. 13** ***18. juni 2023*** **83. árg.**

# Sannleikin og Syndaberarin

*Terje Bentzen*

Jesus sigur tað, sum hann meinar, og meinar tað, sum hann sigur. Hann sigur um seg sjálvan, at hann er Sannleikin. „Eg eri vegurin og sannleikin og lívið. Eingin kemur til faðirin uttan við mær.“ Jóh. 14,6.

Fólk kunnu húðfleingja Sannleikan. Fólk kunnu krossfesta Sannleikan. Fólk kunnu jarða Sannleikan. Men triðja dagin rísur Sannleikin uppaftur. Jesus segði: „Tit skulu læra at kenna sannleikan, og sannleikin skal fría tykkum.“ Jóh. 8,32. Jesus kann seta teg í frælsi uttan mun til, hvat ið tú ert bundin av.

„Ein og hvør, sum er av sannleikanum, hoyrir rødd mína,“ sigur Jesus eisini. (Jóh. 18,37). Hvussu síggja vit Jesus? Pilatus dugdi als einki at síggja, hóast sjálvur Sannleikin stóð beint framman fyri honum. „Hvat er sannleiki?“ spurdi hann. (Jóh. 18,38). Teologurin Nikodemus sær Jesus sum ein lærara. „Rabbi, vit vita, at tú ert lærari,“ sigur hann. (Jóh. 3,2). Jóhannes doyparin sær Jesus sum Guds offurlamb. „Sí, Guds lambið, sum ber (burtur) synd heimsins.“ (Jóh. 1,29).

Jesus er Syndaberarin, sum gevur lív. Hann tekur burtur syndir heimsins. Tá ið tú kemur til hansara og bjóðar honum inn í títt hjarta, so bøtir hann ikki upp á títt lív. Hann tekur ikki tey ringastu syndabrekini burtur og pjøssar upp á títt lív. Nei, hann ger nakað nýtt. Hann gevur tær eitt spildurnýtt lív. Tú sleppur at byrja av nýggjum. „Tí um onkur er í Kristi, er hann nýggjur skapningur; hitt gamla er farið, sí, tað er vorðið nýtt!“ (2. Kor. 5,17).

*Effie Campbell* umsetti.

# Bjargaður av eini barnabøn

Ein maður segði mær frá einari hending, sum hann hevði upplivað fyri árum síðani:

„Eg koyrdi eftir oynni. Eg hevði 8 ára gamla sonin við mær, og eitt yngri barn sat millum meg og hann. Tá ið vit vóru onkustaðni millum Kollafjørð og Hósvík, fór at kava av grimd. Himmal og jørð stóðu í einum roki, og eg sá ikki fram um nøsina. Eg visti ikki, um eg var farin av vegnum, ella um eg enn koyrdi á honum. Eg sá heldur ikki, um nakar bilur kom ímóti mær. Eg var í dýrastu neyð, tí eg hugsaði um hesi smáu børnini, sum eg hevði ábyrgdina av. Eg traðkaði á bremsuna og steðgaði bilinum.

Tá letur alt í einum í soni mínum: „Babba, baðst tú ikki, áðrenn tú fórt heimanífrá?“ Eg hugdi yvir á hann, og hann segði: „Nú skal eg biðja!“ So bað hann hart faðirvár.

Eg hugsaði í mínum stilla sinni: „Hvat man hatta kunna hjálpa okkum?“ Men tá ið bønin var liðug, gjørdi hann eitt, sum tú ikki væntar av einum 8 ára gomlum barni. Hann legði hondina á bilrútin og segði: „Jesus, tú rætti hondina út móti storminum á sjónum og hótti at honum, og tað bleiv púra stilt. Nú geri eg sum tú. Eg rætti hondina út og biði, at hetta kavarokið skal gevast.“

Eg sat undrandi og hugdi rundan um meg, tí í somu løtu, ið drongurin legði hondina á rútin, gavst tað ikki bara at kava, nei, sólin kom eisini fram. Nú sá eg, hvar ið eg var, og kundi halda fram við ferðini.

Her síggja vit, hvussu sterk trúgvin hjá børnum er. Tey taka Gud upp á orðið. Eg havi ongantíð kunnað gloymt hesa hendingina. Sonur mín er vaksin maður í dag.“

*Effie Campbell.*

# Rópa á Harran

*„Sámuel **RÓPAÐI** til Harrans fyri Ísrael, og Harrin bønhoyrdi hann.“ 1. Sám. 7,9.*
*„Tann dag eg **RÓPAÐI**, bønhoyrdi tú meg.“ Sálm. 138,3.*

Á einum húsmøti, sum eg var á, vitnaði ein kona. Hon segði, at hon var í slíkari neyð fyri beiggja sínum. Hann hevði livað eitt hart lív við drekkaríi. Hon bað nógv fyri honum og tosaði eisini við hann um hetta. So bleiv beiggin sjúkur. Hann fekk

demens, og sjúkan versnaði ógvuliga skjótt, og so kundi hann ikki tosa. Hann tosaði ikki í trý ár. Hon sat við songarstokkin hjá honum og bað og bað og bað, og so græt og græt hon, og so aftur at biðja.

Í síni sváru neyð fór hon at RÓPA. Hon rópti á Harran og segði: „Eg røkki ikki inn til hansara, men Skriftin sigur, at einki er ógjørligt hjá tær. Tú røkkur inn til hansara. Frels hann, Harri. Hann má ikki fara av verðini, fyrr enn tú gevur mær eitt tekn, at hann er frelstur."

Tá fóru eygnalokini at darra, og so læt hann eyguni upp og segði við einum strálandi smíli: „Eg havi sæð HANN. – Eg havi sæð HANN. – Eg havi sæð HANN."

Systirin sat púra málleys. Beiggin hevði ikki tosað í trý ár. – Vit biðja, men vænta vit svar? Áðrenn systirin fekk málið fyri seg, spurdi beiggin: „Hevur tú sæð HANN? – Hevur tú sæð HANN? – Hevur tú sæð HANN?"

„Ja, eg havi sæð HANN!" svaraði hon.

Stutt eftir doyði beiggin. Hann hevði ikki tosað í trý ár, og nú enturtók hann tað, sum hann vildi siga systrini, tríggjar ferðir. Tað var ein frøi á henni. Gud er góður og trúfastur. Alt er ikki, sum tað tykist, sjálvt um tey liggja sum heiladeyð, hoyra tey kortini. Orðini koma inn gjøgnum oyruni og upp til heilan. Tey koda inn, men fáa ikki koda út, har er eitt leyst forbindilsi.

*Effie Campbell.*

# Hvør vann?

Ein dagin kom ein ung genta, sum hoyrdi til meinigheitina hjá Spurgeon, at vitja hann. Hon segði, at hon kom fyri at siga honum tey gleðiligu tíðindi, at hon var vorðin trúlovað. Men Spurgeon helt, at tað var okkurt í tónalagi hennara, sum bendi á, at tað var onkur meinbogi við hesi trúloving. Og av tí at hann kendi hesa ungu gentu sum eina reinmeinta og heilhugaða trúgvandi gentu, grunaði hann beinanvegin, hvat ið tað var, sum bagdi. Hann spurdi hana tí bart út, um drongur hennara var trúgvandi.

„Á nei, ikki rættiliga," svaraði hon eitt sindur drálandi. Men so kvikaði hon sær at leggja afturat: „Eg eri vís í, at hann skjótt verður trúgvandi, tí hann er ein reiðiligur maður, rætthugsandi og hevur nógvar góðar eginleikar. Eg skal við Guds hjálp skjótt vinna hann fyri Kristus."

Spurgeon hugdi álvarsliga at henni og segði so: „Far upp á hetta borðið!“

Unga gentan helt, at hetta var ein løgin áheitan og hugdi spyrjandi at honum. Men Spurgeon endurtók sína áheitan. Og av tí at hon visti, at hesin álvarsligi maðurin ikki helt hana fyri gjøldur, tordi hon ikki annað enn at vera lýðin. Hon steig upp á sofuna og haðani upp á borðið og undraðist stórliga, hvat ið hetta mundi hava at týða.

Síðani stillaði Spurgeon seg við síðuna av borðinum og bað hana lyfta hann upp til sín. Hetta var sjálvandi heilt ógjørligt, so mikið meira sum at Spurgeon var væl í holdum. Hin unga gentan smíltist.

Tá tók Spurgeon hana í armar sínar og lyfti hana sum einki niður á gólvið og spurdi síðani: „Hjá hvørjum eydnaðist tað best, hjá tær at lyfta meg upp, ella hjá mær at draga teg niður á gólvið?“

Unga gentan fór til hús við nógvum álvarsligum tonkum í sál síni. Ikki vardi leingi, til hon aftur stakk inn á gólvið hjá presti og segði, at hon hevði gjørt tað til einkis fyribils.

Men álvari var í hennara kristindómi, og hennara atburður kom sum ein skelkur fyri drong hennara. Hann vendi við. Eftir nøkur ár blivu tey maður og kona og fóru út til India at boða evangeliið.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Tað, sum vit fylla okkum við dagliga, kemur at ávirka okkara hug og hjarta. Vit kunnu ikki liva eitt dupult lív, har vit viðhvørt liva saman við Jesusi og aðrar tíðir liva, sum okkum lystir. Bíblian er greið. Vit kunnu ikki tæna tveimum harrum.

*e.c.* ums.

---

Eingin er so blindur sum tann, sum ikki vil síggja. Og tað nyttar einki at kjakast við ein, sum er litblindur.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 18. juni | **Tekstur:** | Áps. 16,6-10 + 16-34 | **Bíbliuorð:** | Jes. 45,2a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 14** ***2. juli 2023*** **83. árg.**

# Rætti mátin at trúgva

Ein formaður á einari verksmiðju var komin so langt, at honum longdist eftir at gerast eitt Guds barn. Hann hevði sæð synd sína og glataðu støðu. Hann hevði ofta hoyrt vitnisburðin um Kristi deyða og frelsuna av náði. Hann trúði hesum eisini. Kortini, so mundi hann ikki trúgva tí heilt, tí hann hevði ikki frið og gleði í sálini, so sum hann sá, at Guds fólk høvdu.

Ein dagin fekk hann bræv frá stjóranum á verksmiðjuni, sum bað hann koma heim til sín kl. 7 á kvøldi. Hann møtti stundisliga, og stovugentan vísti honum inn. Tá ið stjórin sá hann, segði hann: „Kom henda vegin." Tá ið teir vóru einsamallir á skrivstovuni, vendi stjórin sær á og hugdi spyrjandi upp á formannin, sum væntaði hann sær at hoyra, hvørji ørindini vóru hjá formanninum. Bilsin togaði formaðurin brævið upp úr lummanum og segði: „Eg havi fingið eitt bræv frá tygum."

„Á, brævið," svaraði stjórin. „Tú trúði altso orðum mínum?"

„Tá ið tú hevur skrivað tað, so skuldi eg helst gjørt, sum tú skrivaði," segði formaðurin drálandi.

Tá tók stjórin ein lepa fram, har hann hevði skrivað trý bíbliuorð. Hann rætti honum seðilin og segði: „Trúgv Guds orði á sama máta, sum tú trýrt mínum. Hann meinar tað, Hann sigur. Og um tú trýrt Honum, ert tú frelstur og hevur ævigt lív."

Tá ið formaðurin kom til hús, las hann lepan, og har stóðu hesi skriftstøð:

**1.** „Komið higar til mín øll tit, sum arbeiða og ganga undir tungum byrðum, og eg vil veita tykkum hvílu."
*Matt. 11,28.*

2. „Komið, latið okkum tala saman um rætt! sigur Harrin; um so syndir tykkara eru sum skarlak, skulu tær verða hvítar sum kavi; um tær eru so reyðar sum purpur, skulu tær verða sum hvít ull.“ *Jes. 1,8 V.D.*
3. „Sanniliga, sanniliga sigi eg tykkum: „Tann, sum hoyrir orð mítt og trýr honum, sum sendi meg, hevur ævigt lív og kemur ikki til dóms, men hann hevur stigið yvirum frá deyðanum til lívið.“ *Jóh. 5,24.*

Tá klárnaði tað fyri hinum, tí Guds orð segði „kom“, so skuldi hann koma, eins og tá ið stjórin bað hann koma. Og øllum Guds orðum skuldi hann trúgva „á sama máta“, sum hann trúði orðunum hjá sínum jarðiska harra.

Tað gjørdi hann frá hesum degi. Hann fyltist við gleði og friði. „Sum tað er einfalt og lætt,“ brast út úr honum. „Nú síggi eg tað, nú skilji eg rætta mátan at trúgva.“

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein samrøða

„Eg veit, at tú ert ein skilagóður og ærligur maður,“ segði ein ateistur við ein prædikumann, „so sig tú mær bart út: Heldur tú veruliga, at eg havi eina sál?“

„Ja, tað haldi eg.“

„Hvussu kann ein maður sum tú trúgva slíkum? Far inn í eina rannsóknarstovu, har fært tú at síggja nakrar fløskur við vatni, kálki, sukri, fosfori, kolevni, stívilsi og øðrum evnum. Sært tú, har hevur tú eitt menniskja. Hatta er úrslitið hjá vísindamonnum, eftir at teir hava kannað tað ógvuliga gjølla. Nú biði eg teg siga mær, hvar finnur tú sálina í øllum hesum?“

Prædikumaðurin hugsaði seg um eina løtu og segði so: „Tú mást orsaka meg, men eg eri ikki førur fyri at fylgja tíni tankagongd.“

„Á, hugsaði eg tað ikki altíð, tú vilt snúgva tær uttanum! Soleiðis eru tey, hesi trúgvandi. Tá ið tú setur teimum stólin fyri dyrnar, hava tey seg undan og sýta fyri at svara! Og tað er sjálvandi tí, at tey duga ikki at svara!“

„Nei, orsaka, tú fert púra skeivur. Men av tí at eg eri ein skilagóður maður, sum tú hevur givið tær far um, hvussu skal eg tá fáa ein mann, sum bara er settur saman av vatni, sukri, kálki, stívilsi, fosfori, kolevni og tílíkum, at skilja tað?

Hvar eru skilið, vitið og samvitskan? Fyri at siga tað bart úr, so finni eg ikki teg í øllum hesum?“

Her endar samrøðan. *Effie Campbell* umsetti.

# Tala orð, sum byggja upp

*„Tá hevur tú latið teg binda við orðum av munni tínum, latið teg hefta við orðum av munni tínum.“ Orðt. 6,2.*

Stormie Omartian sigur: „Stutt eftir, at eg varð umvend og byrjaði at ganga saman við Harranum, segði eg nógv negativ ting: „Eg eri miseydnað – Eg eri ljót og mishátt – Einki eydnast hjá mær – Tað er eingin, sum leggur í meg.“

So talaði Heilagi Andin til hjarta mítt: „Deyði og lív eru í tungunnar valdi.“ Orðt. 18,21. Eg hevði talað orð, sum skapa deyða, ikki lív.

Eitt týðiligt dømi var ein trupulleiki, sum eg hevði, tá ið eg skuldi tosa alment. Eg hevði havt ein trupulleika frá barnaárunum, og eg varð argað við tí øll skúlaárini.

Tá ið eg var nóg gomul at leita mær professionella hjálp, vandi eg hjá einum talupedagogi. Eg vandi hvønn dag, ár um ár, fyri bara at fáa ein lítlan bata. Eg misti framvegis røddina, tá ið eg var komin í helvt við tað, eg skuldi siga. „Eg fari ongantíð at tosa ordiligt,“ græt eg.

Men tá ið eg segði hasi orðini, segði Harrin við meg: „Tú førir deyða inn yvir tína støðu, av tí at tú ikki sigur sannleikan. Tú skalt ikki siga tað, sum tú hugsar, ella tað, sum tú kennir og følir sum sannleikan. Tú skalt siga tað, tú veitst, er sannleikin í mínum Orði, sum til dømis hetta: „Stamandi tunga skal tala orðaraðið og týðiliga.“ Jes. 32,4 – „Orð míni havi eg lagt í tín munn og lívt tær við skugga handar mínar.“ Jes. 51,16.

Stutt eftir, tá ið eg skuldi tala á einum kvinnumøti, legði eg allan mín ótta fram fyri Gud, og eg segði hansara sannleika, staðin fyri at siga mínar negativu meiningar. Tað gekk so gott við mínari talu, og ein heil tænasta, har eg skuldi ferðast víða hvar at tala og undirvísa, lat seg upp fyri mær.“

Bíblian sigur: „Tú ert bundin av tí, sum tú sjálvur sigur.“ (Orðt. 6,2). Tak og strika tey orðini úr tínum orðatilfari, sum snúgva seg um vónloysi, iva og negativitet. Tey tykjast kanska óskaðilig, men tey ávirka tín kropp og tína sál. Tala orð, sum byggja teg upp og gera teg heila og fríska innan.

*„… et Ord til Dagen“ – Effie Campbell* umsetti.

# Tey kalla meg Meistara

og spyrja meg ikki.
**Tey kalla meg Ljósið**
og síggja meg ikki.
**Tey kalla meg Vegin**
og fylgja mær ikki.
**Tey kalla meg Lívið**
og ynskja meg ikki.
**Tey kalla meg vísan**
og akta meg ikki.
**Tey kalla meg ríkan**
og ákalla meg ikki.
**Tey kalla meg sannan**
og trúgva mær ikki.
**Tey kalla meg miklan**
og æra meg ikki.
– – –
Um eg skúgvi tey frá mær
so undrast ikki.

*Effie Campbell* umsetti.

---

# Ofra til Gud

Ein trúgvandi kona lá at doyggja. Hon hevði altíð givið nógv til Guds ríkis arbeiði. „Mamma, eg haldi, at tú gevur alt ov nógv," segði sonur hennara. Tá hon lá til tað síðsta, bað hon sonin geva missiónini diamantringin hjá sær. Og so legði hon afturat: „Eg má geva nú, tí ein deyð hond kann einki geva. Harumframt, har uppi eru gøturnar av gulli, og har er nóg mikið av diamantum av øllum sløgum."

Tú veitst, hvat ið hevur týdning? Tað er, at sálirnar verða frelstar. Tú skilir, at Jesus er týdningarmikil fyri Føroyar.

Uttan Jesus er úti við okkum, og vit vita, at hann kemur skjótt. Brádliga er alt liðugt, og vit eru heima hjá Jesusi.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74